VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið



Veðrið í morgin
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Seint um kvøldið møguliga regn. Hitin millum 14 og 17 stig.



Veðrið leygardagin:
Lot til andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men seint um kvøldið friskar hann vindin upp í stívt andøvsgul og møguliga regn. Hitin millum 11 og 14 stig.



Veðrið Hvítusunnudag:
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av útsynningi og eitt skifti regn. Seinnapartin minni vindur og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

Veðrið 2. Hvítusunnudag og týsdagin:
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 10 og 14 stig.

Fútastova aftur undir flag

Síðsta hond er nú løgd á høvuðsumvælingina av Fútastovu í Gongini í Havn, sum hýsir ísendska aðalkonsulátinum

VARÐVEITING
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Teir báðir serfrøðingarnir í gomlum føroyskum byggisiði, Martin Mørk og Anngrím Árting, hava nú lagt síðstu hond á umvælingina av Fútastovu. Í vikuni varð flagið lagt á tekjuna
Mynd: Jens Kristian Vang

Í vikuni hava snikkararnir Martin Mørk og Anngrím Árting lagt flag á aldagomlu Fútastovu í Gongini í Havn. Teir báðir hava drúgvar royndir í at umvæla gomul føroysk hús – og eru at kalla serfrøðingar í gomlum føroyskum byggisiði, finskari tjøru og flagtekjum.

Fútastova er av elstu húsum í býnum, og hon er tey seinstu árini høvuðsumvæld. Húsini eru friðað sum fornminni, og tí er arbeiðið gjørt í samráð við Fornminnissavnið, sum hevur eftirlit við øllum friðaðum bygningum í Føroyum.

Tað er felagið Farec hjá Óla Samró, sum eigur húsini.

Nógv ymiskt virksemi hevur verið í Fútastovu gjøgnum árini. Sum navnið sigur vóru húsini fútahús, men tað eru nú nógv ár síðani, at fólk hava búð í Fútastovu – helst ikki síðani fútin einaferð tíðliga í næst síðstu øld flutt úr húsunum. Fara vit eini 200 ár aftur í tíðina, so lógu embætishúsini har grannalagnum, sum er elsta búpláss í Havn – fyrr nevnt "heima í Havn". Har búðu eisini sorinskrivarin og handilsforvaltarin.

Sum so mong onnur flagtakt hús, misti Fútastova flagið einaferð í tíðini – og zink varð lag á ís taðin. Á gomlum myndum síggja vit, at húsini í 1911 hava flag, og at tey í 1920 hava zink á takinum, so vit kunnu staðfesta, at húsini ikki hava havt flag seinastu áleið 90 árini. Flagið, sum nú er lagt á húsini vigar áleið 25 tons.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	5
Nuuk	7
Qaqortoq	11
Ammassalik	3
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	10
Seyðisfjørður	8
Tórshavn	9
Lerwick	9
Aberdeen	16
London	21
Tromsø	--
Bergen	16
Oslo	--
Stokkhólm	--
Keypmannah.	19
Helsinki	13
Moskva	2
Berlin	19
Warzawa	15
Kiev	6
Bukarest	16
Paris	21
Madrid	27
Róm	21
Malorca	23
Athen	17
Malta	20
Tunis	24
Beijing	18
New Dehli	30
Bangkok	33
Jakarta	31
Sydney	20
New York	24
Miami	26
Los Angeles	15
Meksikobýur	24
Panama	32
La Paz	15
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	22

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt hátrýst, 1025 hPa. yivr Suðurnoreg viknar nakað.



Í da g:
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi stendur mestsum í stað og dýpist. Brúgvalagið haðani kemur handa vegin og verður væntandi yvir Føroyum leygarnáttina.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 6/5 kl. 06⁰⁰ – 7/5 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,4°
Minsti hiti máldur í mai: -9,9° - Mesti hiti máldur í mai: 18,3°

AVFALLIÐ



Avfallið: 2,0 mm – mált frá 3/5 kl. 06⁰⁰ – 4/5 06⁰⁰.
Avfallið higartil í mai: 15 mm

Alt um harmonikur

www.simme.eu

VESTFALLSKYRRINDI

5. mai Tendring
6. mai Mánin næstur jørðini
12. mai Fyrra kvarter

Kelda: Almanakkin 2008

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
8. mai	9:50	22:22	8:50	21:22	9:05	21:37	11:50	-	0:19	12:50	8:05	20:37	7:05	19:37	10:05	22:37	11:05	23:37	9:35	22:07	10:50	23:22
9. mai	10:52	23:22	9:52	22:22	10:07	22:37	0:22	12:52	1:22	13:52	9:07	21:37	8:07	20:37	11:07	23:37	-	12:07	10:37	23:07	11:52	-
10. mai	11:49	-	10:49	23:16	11:04	23:31	1:22	13:49	2:22	14:49	10:04	22:31	9:04	21:31	-	12:04	0:37	13:04	11:34	-	0:22	12:49
11. mai	0:16	12:41	11:41	-	11:56	-	2:16	14:41	3:16	15:41	10:56	23:21	9:56	22:21	0:31	12:56	1:31	13:56	0:01	12:26	1:16	13:41
12. mai	1:06	13:43	0:06	12:43	0:21	12:58	3:06	15:43	4:06	16:43	11:58	-	10:58	23:35	1:21	13:58	2:21	14:58	0:51	13:28	2:06	14:43